gult cyan magenta svart



# Mugu geva alt



- *Vit vóru ov nøgdir um fyrra dystin, heldur Áki Olsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Áki Olsen helt ikki, at føroysku leikararnir vóru nóg uppsettir, tá farið varð inn á vøllin til dystin leygardagin**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Í málskjóting var Áki Olsen tann føroyski leikarin, sum gjørdi mest um seg í teimum báðum dystunum um vikuskiftið, men eins og hjá viðleikarunum, so var avrikið leygardagin als ikki á hædd við tað fríggjadagin.

Møði var kanska ein partur av frágreiðingini, men sambært føroyska toppskjúttanum, so var hetta als ikki einasta frágreiðingin, tá vit fingu orð á hann leygardagin.

– Møði hevur kanska eisini skyldina fyri munin millum dystirnar, men tað er nú ikki allir sannleikin. Mótstøðumenninir eru jú ikki somikið býttir, at teir ikki duga betri at lesa okkum av í dag, enn teir gjørdu í gjár, segði Áki, tá vit setta honum spurningin.

– Hinvegin er tað eisini ólúksáliga hart at spæla tveir slíkar dystir dag um dag. Sjálvur havi eg eisini verið hálvskaddur síðani oktober, og er venjingarstøðan sjálvandi ikki so góð, sum hon kundi verið.

## Ov nøgdir

Annars helt Áki eisini, at sálarligi parturin av spælinum hevði nógv at siga, tá ein orsøk skuldi finnast fyri greiða ósigrinum.

– Tað hevur fyrst og fremst nógv at siga, hvussu mann kemur frá byrjanini av dystinum. Gongst tað væl beinanvegin, so gevur hetta eisini sjálvsálit og dirvi til at royna nakað restina av dystinum, og tað var hetta, sum hendi fríggjadagin.

– Tað hendi ikki i dag, og yvirhøvur haldi eg ikki, at vit vóru nóg tendraðir til at fara á vøllin. Er mann ikki heilt klárur í heysinum, tá dysturin byrjar, so megnar mann ikki at svinga seg upp, tá dysturin er meira ella mini hálvrunnin.

Spurdur, um hetta kanska eisini hekk saman við, at føroysku leikararnir vóru mentalt troyttir til seinna dystin, sigur Áki, at tað er væl møguligt.

– Tað er tað kanska eisini, men tað liggur helst eisini í bakhøvdinum hjá okkum, at dysturin í gjár gekk so mikið væl. Tí roknaðu vit kanska við, at tað eisini skuldi ganga væl í dag, men tað gongur altso ikki, tá spælt verður á hesum støði. Er mann ikki 100% klárur, so verður mann revsaður, og tað vórðu vit eisini í dag, segði Áki Olsen at enda.

# Trívist við trýstinum

**Eftir landsdystirnar, sum føroyska liðið hevur lekt higartil, er einki at ivast í, hvør fremsti vongurin er, men soleiðis hevur ikki altíð veri**

LANDSDYSTIR
*Jákup Mørk*

Tað er einki dulsmál, at tað mundi vera fáir av føroysku monnunum, sum vóru nøgdir um tað, sum teir høvdu avrikað í seinna dystinum móti Sveis um vikuskiftið. Summir mundu tó helst vera betri nøgdir enn aðrir, og ein teirra var uttan iva Hans Áki Dal Christiansen, og hetta hevur hann kanska eisini orsøk til.

Tað er nevnliga so, at kyndilsleikarin í fyrra Rumenia-dystinum ikki taldist millum tryggast føroysku kortini, tó at landsliðsvenjarin neyvan fær søð burtur frá hansara evnum nú eftir at hann hevur verið so sannførandi í teimum fýra dystunum higartil. Spurdur, um nøkur serlig orsøk er til hetta, svarar Hans Áki, at tað heldur hann sum so ikki.

– Tað er eingin loynidómur, annað enn tað, at eg

*framhald á næstu síðu...*



*Hans Áki heldur, at ein av orsøkunum til góðu avrikini er, at tú gevur nakað eyka, tá talan er um slíkar dystir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*




**BÍBLIA**
Kápa: Edward Fuglø
Stødd 125 x 195 mm.,
1211 síður
ISBN 87-7523-421-1
**Kostnaður 150,- kr.**

**BÍBLIA**
Í svørtum leðurlíki við gullskurði
Stødd 125 x 195 mm.,
1211 síður
ISBN 87-7523-423-8
**Kostnaður 250,- kr.**



**BÍBLIA**
**Ríkisbíblia og ættarbíblia**
Í stórari stødd.
Myndprýtt hevur hennara hátign Margreta drotning II
Stødd 215 x 304 mm.
við gullskurði,
1211 síður
ISBN 87-7523-428-9
**Kostnaður 600,- kr.**







**BÍBLIA**
**Í lummastødd**
Í svørtum leðurlíki
við dragulási
Stødd 105 x 164 mm.,
1211 síður
ISBN 87-7523-425-4
**Kostnaður 200,- kr.**

**BÍBLIAN**
**- Úrvalssøgur**
Úrvaldir bíbliutekstir
til børn og vaksin við 50 heilsíðumyndum
hjá Esben Hanefelt Kristensen
Stødd 200 x 235 mm.,
302 síður
ISBN 87-7523-427-0
**Kostnaður 150,- kr.**



Nýggja Bíblian er at fáa í bókahandlunum

**BIBELEN PÅ CD-ROM**
**Dansk/Færøsk/ Grønlandsk**
Í 3. útgávu eru framvísari og leitiforritið Bókaskápíð og ein bókahill við elektron-isku bókunum hjá Bíbliufelagnum:
Bibelen med De Apokryfe Bøger (1992/98)
Det Nye Testamente (1948)
**Bíblia. Halgabók (1961/37)**Biibili
ISBN 87-7523-437-8
(Windows)
**Kostnaður 575,- kr.**






*... framhald*

havi roynt at stríðst fyri plássi mínum.

*Men gera hinir ikki eisini tað?*

– Sjálvandi gera teir tað, men tað hevur bara riggað væl hjá mær.

## Trívist undir trýsti

Spurdur, um tað eisini er soleiðis, at hann trívist undir slíkum stórum uppgávum, svarar hann, at tað er tað so avgjørt.

– Tá man spælir fyri eini fullsettari høll, har áskoðarar og alt uttan um teg er á gosi, so gevur tað sjálvandi nakað eyka, heldur hann, hóast hann er samdur í, at áskoðararnir leygardagin ikki vóru so øgiliga stórur stuðul.

– Annars var dysturin í dag ikki nakað serliga stórur frá okkara síðu. Vit kunnu ikki bara skylda upp á møðina, tí teir spældu jú eisini tveir dagar á rað, men tað er einki at ivast í, at teir vóru sera væl fyri kropsliga, sigur Hans Áki.

Um dystin fríggjadagin var hann tó nakað væl betri nøgdur. Bæði persónliga, og fyri liðið.

– Tá spældu allir jú upp til sítt besta. Í dag var tað helst bara Jens (Skipagøta), sum gjørdi um seg, men eg má viðganga, at hann ikki fekk nakað serligt av hjálp frá okkum.

Hans Áki fekk tó ikki allan dystin við fríggjadagin, tí í seinna hálvleiki sást hann eina løtu fáa viðgerð fyri onkran snudd úti við føroyska skiftibeinkin. Eftir dystin kundi hann sissa viðhaldsfólkini, tí sambært spælaranum sjálvum, so var talan als ikki um nakran álvarsligan skaða.

– Bjarni og eg runnu aftur, og onkursvegna rendi eg øklaknútin í beinið hjá Bjarna, so eg gjørdist nakað eymur. Nakar álvarsligur skaði er tað so ikki, og eg eri klárur at dystast aftur komandi vikuskiftið segði Hans Áki Dal Christiansen at enda.

# Venjingin restar í

**Heini Joensen var ikki nøgdur um persónliga avrikið í landsdystunum, men roknar við, at hetta verður, nú hann fær vant við liðnum komandi vikuna**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at tey flestu sóu tað sum ein styrk, at Heini Joensen var komin heim til landsliðsuppgávurnar móti sveisarum.

Dystirnar móti rumenum mátti hann vera fyri uttan orsakað av próvtøkum í Danmark, og tað var ikki fyrr enn hósdagin, at sterki lámurin fekk sett kós móti Føroyum.

Sjálvur sigur Heini, at hann sjálvsagt er fegin um, at hann nú fekk møguleikan at spæla á landsliðnum, men hann legði samstundis dent á, at hann avgjørt ikki var nøgdur um avrikið hjá sær sjálvum.

– Nei, tað er eg sjálvandi ikki. Fyrst og fremst, tí eg ikki fekk meira enn ein hálvleik á vøllinum, men eisini tí tað ikki gekk nóg væl, tá eg var inni. Í verjupartinum rigga avtalurnar ikki nóg væl, sum er, og hetta er heilt víst nakað, sum stavar frá, at eg ikki havi fingið vant saman við viðleikarunum, heldur Heini.

– Eins og fleiri av viðleikarunum, so fílist Heini eisini á, at føroysku leikararnir kanska vóru ov nøgdir um úrslitið fríggjadagin.

– Vit taka kanska ikki uppgávuna í nóg stórum álvara í dag, ella hvussu eg skal siga tað. Tað kendist eisini áðrenn dystin, har konsentratiónin ikki var hin sama, og hetta er so bara nakað, sum vit mugu betra.

## Trívist ikki á veinginum

Í fyrra dystinum sóu vit eina løtu spæla Heina royna seg á veinginum, og hóast hetta tóktist at styrkja føroyska spælið, so er hetta so avgjørt ikki tað plássið, sum spælarin sjálvur vil spæla.

– Eg havi alt ongar royndir á tí plássinum, og tí vil eg sjálvsagt heldur spæla aðra staðni á vøllinum. Eg varð tó settur út á plássið, og verið eg tað eisini framyvir, so má eg bara royna at gera tað betri, enn eg gjørdi hesaferð, segði Heini.

## Framtíðin

Sum nevnt, so fær Heini møguleikan at venja saman við føroyska liðnum fram til komandi uppgávurnar móti Litava, men umframt hetta, so vónar Heini, at føroyska liðið eisini fer at fáa fleiri avbjóðingar í ár.

- Tað er avgerandi fyri okkum, vit eisini fáa stórar avbjóðingar í framtíðini. Júst tí er tað eisini spell, at vit tapa so nógv í dag, tí hetta kann halda okkum frá at fáa nakrar rættiliga avbjóðingar, um so er, at onnur lið ikki rokna nakað serligt við okkum.

Í hesum sambandi leggur Heini eisini afturat, at tað er av stórum týdningi, at hondbóltssambandi eisini finnur ein væl egnaðan avloysara til Palla Joensen, tá hesin leggur frá sær eftir dystirnar móti Litava.

– Tað er av alstórum týdningi, at tað er ein maður við neyðuga innlitinum í hondbóltin. Ein sum dugur at leggja eina langsiktaða ætlan við liðnum, og sum er førur fyri at arbeiða støðugt við hesari.

Spurdur um hann hevur nakað boð um, hvør hesin maðurin kundi verið, svarar Heini, at í hansara hugaheimi er núverandi hjálparvenjarin ein, sum væl kundi verið settur til uppgávuna.

- Rapa hevur sum so allar fortreytirnar, og hann er eisini væl dámdur av leikarunum, so hann kundi í øllum førum verið ein møguleiki. Um tað verður hann, kann eg tó ikki geva nakað svar uppá, men tað er so ein møguleiki. Annars haldi, at tað kundi verið eitt gott hugskot, at HSF eisini leitaði sær hjálp frá onkrum av gomlu landsliðsspælarunum. Teir, sum spældu í sjeyti- og áttatiárunum, hava jú sjálvir verið ígjøgnum ta prosessina, sum vit skulu ígjøgnum nú, so tað kundi væl verið eitt gott hugskot, at onkur av hesum eisini var við í myndini, sigur Heini Joensen at enda.



*Heini heldur ein hin størsta missin við stóra tapinum vera, at hetta kann koma aftur um brekku, tá vit í framtíðini skulu royna at fáa venjingardystir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*


SJÓVINNUFYRISITINGIN

LØGFRØÐINGUR TIL SJÓVINNUFYRISITINGINA

Sjóvinnufyrisitingin, ið er deild í Fiskimálastýrinum, umsitur løgtingslóggávu innan sjóvinnu, sum er:
Manningarlógin -
Sjómanslógin -
Mynstringarlógin -
Skipaskrásetingarlógin,
FS og Føroyska Altjóða Skipaskrásetingarlógin, FAS.

Sjóvinnufyrisitingin hevur eisini til uppgávu at viðgera og ummæla ríkislógir innan sjóvinnu, sum ætlanin er at seta í gildi í Føroyum.

Fyri at at menna bæði lóggávu og fyrisiting til ein vaksandi tørv á tænastum, søkja vit eftir løgfrøðingi til Sjóvinnufyrisitingini.

Starvið
Høvuðsuppgávan hjá løgfrøðinginum verður at veita løgfrøðiliga ráðgeving og at umsita og hava løgfrøðiliga málsviðgerð innan sjóvinnumál.
Eisini kemur viðkomandi at hava ábyrgd av at umsita skipaskrásetingarlógirnar FS og FAS og at gera Føroysku Altjóða Skipaskránna FAS sjónliga, serliga uttanlands.
Høvi verður hjá løgfrøðinginum at seta seg inn í millumlanda sáttmálar innan sjóvinnu, eitt nú innan ST-felagsskapirnar IMO og ILO og at umboða Føroyar, saman við Danmark, í hesum felagsskapum. Viðkomandi skal eisini kunna átaka sær aðrar uppgávur innan fiskivinnuøkið í Fiskimálastýrinum.

Førleikakrøv
Tað er eitt krav, at umsøkjarin hevur:
· løgfrøðiliga útbúgving
· góðan kunnleika til føroyskt og enskt mál
· góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
· góð samstarvsevni og evni at fyriskipa
Tað er ein fyrimunur at hava starvsroyndir innan økið.

Setanarviðurskifti
Setanartreytir og løn verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkis-felag. Setanarøkið er Fiskimálastýrið, og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýrir og løgmansskrivstovuna.

Umsóknarfreist
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Sjóvinnufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 1. februar 2001.

Umsóknir skulu sendast til:
Sjóvinnufyrisitingin
Postsmoga 347
110 Tórshavn

Nærri upplýsing um starvið fáast við at ringja til Sjóvinnufyrisitingin, á tlf. 313669 og tosa við Eyðun Berth Jacobsen, deildarstjóra.

SJÓVINNUFYRISITINGIN - Yviri við Strond 19 - Postsmoga 347 FO 110 Tórshavn - Telefon 31 36 69 - Telefax31 36 14 - E-mail: sjovinnu@sjovinnu.fo

STEPHANSSONS HUS.FO


gult cyan magenta svart